| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**18. mai 2006** | Blað nr.:<br>**6586**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **18. mai 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **90/06-108/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Boði Haraldson
Eyðbjørn Larsen

**SKRIVARI:**
Heri Olsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

Áðrenn tann almenni býráðsfundurin byrjaði, helt Heðin Mortensen, borgarstjóri, minningarorð um Petur Christiansen, sála.

**94/06** **<u>2006-0221</u>**

**<u>Mál beind í nevndir</u>.**

**Býráðið 18. mai 2006:** Tikið til eftirtektar.

**95/06** **<u>2002-2014</u>**

**<u>Rundkoyring við Hvítanesvegin/Eystari Ringveg: tekniskt projekt og keyp av lendi til rundkoyringina</u>**

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at útseta ætlanina at gera rundkoyring á vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur í hesum árinum vegna tess, at tað ikki hevur eydnast at útvega lendi til rundkoyringina.

Upphæddin, sum eftir er av játtanini 2,7 mió. kr., verður afturflutt til konto fyri íløgur, sum tøkur peningur til aðrar íløgur.

Umsitingin arbeiðir víðari við málinum at útvega lendi til hesa nýggju rundkoyringina at leggja fyri nevndina í seinasta lagi 1. oktober 2005, so málið kann verða loyst.

**Tekniska nevnd 7. apríl 2005:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Katrin Dahl Jakobsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, og at ein endalig niðurstøða frá umsitingini um matrikuleru viðurskiftini fyriliggur í seinasta lagi 1. oktober 2005.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at halda fast við ætlanina at samráðast við Torbjørn Sørensen.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.
**Býráðið fyri læstum hurðum 21. apríl 2005:** Málið var viðgjørt á opnum fundi.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Atkvøtt var um meirilutatilráðingina í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen. Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Samtykt við 7-6 atkvøðum.

**Ískoyti:**
Áðrenn umsitingin via fíggjarnevndina útvegar lendi til rundkoyringina, eigur støða at verða tikin til um farast skal víðari í ætlanini og hvussu projektið skal fíggjast.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Nevndin samtykti at halda fast við nýggju ætlanini um gerð av rundkoyring (sí skjal nr.2002-2014/67) og at fáa eina loysn á málinum sum skjótast at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sent Vinnumálaráðnum skriv um keyp av lendi í sambandi við gerð av rundkoyring, fyri síðani at makabýta keypta lendið við eigaran Torbjørn Sørensen, sí j. nr. 2000-2014/84. Í telefonsamrøðu við Niels Winther frá Vinnumálaráðnum er henda mannagongdin ikki røtt. Hann mælir til at økið verður ognartikið til verkætlanina.

Nevndin skal taka støðu til:
1. um Tórshavnar kommuna skal ognartaka 400 m² frá Tórbirni Sørensen, so ætlanin kann førast út í verki.
2. um farast skal víðari at gera detajlprojekt.
3. um projekteringsarbeiðið skal bjóðast út til ymiskar ráðgevarar.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við at farið verður undir projekteringsarbeiðið at gera rundkoyringina.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at keypa umleið 400 fermetrar frá Føroya landsstýri at makaskifta við Tórbjørn Sørensen.

Tá keypið er avgreitt, verður heimilað umsitingini at fara undir projekterings-arbeiðið at gera rundkoyringina.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at taka upp samráðingar um útvegan av lendi.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at keypa umleið 400 ferm. frá Landsverki at nýta til gerðabýti til útvegan av øki til rundkoyringina.

Eisini verður mælt til at farið verður undir fyrireikingar til gerð av rundkoyring.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**96/06** **2006-1344**

**Kirkjugarðurin á Svínaryggi, ábøtur og endurnýggjan**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kirkjugarðurin á Svínaryggi í Tórshavn, matr. nr. 851, treingir til ábøtur:

1. Rimaverkið fram við J. Paturssonargøtu er illa farið og skal skiftast út við nýtt rimaverk.
2. Vatnburturveitingartrupulleikar í niðasta partinum skulu skipast.
3. Høvuðsgøta og gøtur skulu umvælast, partar skulu breiðkast, vatnavveiting skipast og nýtt ábreiði leggjast á gøturnar.
4. Portur skulu umvælast og nýggj inngongd skipast við J. Paturssonar-gøtu/Dalavegin.
5. Verandi ljós fáast at rigga og nýggj ljós setast fram við gøtuni niðan til J. Paturssonargøtu/Dalavegin.
6. Umvæla og mála verandi træ-rimaverk og seta upp kunningartalvu.
7. Partar av gravøkjunum hampast við mold.

**Kostnaðarmeting:**

| | | |
|---|---|---|
| Nýtt rimaverk | kr. | 110.000,00 |
| Portur og inngongd/trappa | - | 30.000,00 |
| Vatnburturveiting, brunnur og dren | - | 10.000,00 |
| Gøtur, nýgerð | - | 35.000,00 |
| Gøtur verandi, umvæling | - | 50.000,00 |
| Ljós umvæling | | 10.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Nýggj ljós | - | 20.000,00 |
| Máling og timburumvæling | - | 20.000,00 |
| Mold o.a. | - | 50.000,00 |
| Nýggir beinkir | - | 15.000,00 |
| Talva | - | 10.000,00 |

Samlað kostnaðarmeting 350-400.000 kr.

Kirkjugarðurin er meira enn 200 ára gamal og undir friðing, tað verður ikki hildið hóskandi at leggja asfalt ella oljugrús á gøturnar. Loyvi skal fáast frá friðingar-myndugleikunum at gera umvælingina.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fremja ætlanina og at beina málið til fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at peningurin verður játtaður av konto fyri fríðkan av býnum.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 400.000,00 av íløgum til fríðkan av býnum.

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**97/06** **<u>1999-0295</u>**

**<u>Ognin hjá Elisu og Williami Heinesen við Varðagøtu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Húsini eru bygd í 1932 og standa húsini og smátta á einum grundøki, ið er umleið 1950 m².

**Á fundi í mentamálanevndini 18. oktober 2000** samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við at gera húsini og smáttuna til eitt komandi William Heinesens savn.

Í tilmælinum til fundin verður m.a. sagt:

“Mentamálanevndin hevur longu á fundi 3. mai 1999 tikið undir við, at húsið og smáttan hjá Williami Heinesen verða á somu ogn, av tí at økið var mett at hava søguligan og mentunarligan týdning.

William var heimsborgari, hevði lisið heimsbókmentirnar, kendi teir stóru tónasmiðirnar, myndlistina og heimsspekina. Hann sat uppi undir Varða í lítlu smáttu sínari og skapti heimsbókmentir.

Í 1980 samtykti býráðið at tilnevna William til heiðursborgara í Havn við teirri grundgeving, at hann hevði gjørt hana (Havnina) kenda út um landamørk.

Eisini verður mælt til, at kommunan verður við til at gera húsini og smáttuna til eitt komandi William Heinesens savn."

Mentamálanevndin fer á staðið við Varðagøtu at hyggja eftir ognini, kl. 11.00.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Zacharias Heinesen, sonur Elisu og William Heinesen, kunnaði nevndina um húsini og ognina hjá foreldrunum.

Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**Lýsing av málinum:**
Mentamálanevndin var 19. november 2003 boðin niðan undir Varða at síggja ognina hjá Williami Heinesen. Zacharias Heinesen, sonur Elisu og William, tók ímóti og vísti ognina fram: sethús, hoyggjhús/fjós og smáttuna – *hyttuna* – har William sat og skrivaði.

Arvingarnir ynskja at selja Tórshavnar kommunu ognina, sum er 1950 m² stór. Í søluni er harumframt innbúgv, bøkur og listaverk í sethúsinum. Tað kann eisini koma uppá tal at onnur listaverk, sum eru í varðveitslu hjá synum Williams. Húsini kunnu nýtast til eitt komandi William Heinesen savn.

Húsasøgan er í stuttum tann, at William fekk byggiloyvi í 1932 á leigutrøð til sethús og úthús. Í 1936 fær hann loyvi at byggja hoyggjhús og fjós, og í 1979 verður bygt uppí vestureftir.

Ognin stendur sum sagt á eini trøð. Hoyggjhús og fjós siga frá, at tey hava fingist við jarðarbrúk, men nærhendis smáttuni er hagalendi, har lyngur veksur. Suðureftir er ein størri urtagarður.

Verður fyrst hugsað um húsini innan, so ber til at taka samanum og staðfesta, at húsini eru bæði eini traðarmannahús og eitt føroyskt borgaraheim - innbúgv, list, bøkur og prýðislutir siga frá hesum. Hetta eru ikki eini óvanlig hús í Havn, men frá einum mentanarsøguligum sjónarhorni eitt áhugavert dømi.

Úthúsið, sum er innrættað til hoyggjhús og fjós, hava sum so einki byggisøguligt virði og kunnu broytast og framyvir brúkast til ymisk endamál, eitt nú sum íbúð og verkstaður hjá myndlistafólkum í styttri ella longri tíð.

Loftið í sethúsunum kann innrættast til ymiskt, sum hevur týdning fyri ognina, meðan stovurnar í miðhæddini eiga at verða brúktar at vísa fram. Í kjallaranum,

har William á seinni árum fekst við síni litklipp, kann eisini vera brúkt at vísa fram, verkstaður ella goymsla.

Í løtuni er einki innbúgv í smáttuni, men borð o.a. er til, so tað ber til at seta hana í sama stand sum áður. Smáttan kann gerast ”skrivarastova” við bókasavni, teldu og ørðum.

Ognin hjá Elisu og Williami kann gerast karmur um annað listarligt virksemi. William fekst við myndlist, men fyrst av øllum var hann rithøvundur. Listasavn Føroya kundi brúkt húsini til kunnandi virksemi, eitt nú skúlatænastu og Tórshavnar býarsavn kundi eisini brúkt húsini. Bókmentafrøðingar hava helst eisini áhuga í at vitja heimið. Kunningarstovan eigur eisini at sleppa framat, soleiðis at almenningurin fær høvið at síggja húsini hjá Williami – *stjørnuskaldinum undir Varða*. (Og her er óivað nógv onnur hugskot sum mangla).

Álitið um mentan og list í Tórshavnar kommunu (2000), ”Havnin – livandi, kveikjandi, skapandi”, nevndir á s. 62-63, at *”William Heinesen, sum hevur gjørt Havnina kenda um allan heim, var lista-maður á fleiri ymiskum økjum og virkin í skaldskapi, myndlist, tónleiki og sjónleiki...”*

Tað er eingin ivi um, at tilboðið at keypa ognina hjá Williami einans kemur fyri eina ferð. Við teimum mongu listargávum Williams, sum í dag m.a. eru skjalfest á veggunum í heiminum, fæst ein dýrgripur til mentanarlívið í býnum. William er kendasta havnarfólkið nakrantíð.

Støða má takast til um kommunan vil ogna sær ognina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Samskifti hevur verið við Velux um at stuðla ætlanini. Velux er helst sinnað at veita stuðul til keypið av ognunum. Fyritreytin er tá:

<u>at</u> ein óheftur grunnur verður stovnsettur við eginogn á kr. 275.000,00.
<u>at</u> Tórshavnar kommuna veitir grunninum bindandi tilsøgn um stuðul á kr. 800-1.000.000 til ístandsetan av ognunum.
<u>at</u> Tórshavnar kommuna gevur grunninum bindandi tilsøgn um árligan rakstrarstuðul (50.000) og rindar møguligt hall (inntil 50.000 árliga). Hetta skal Innlendismálaráðið góðkenna fyrst.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir býraðnum til, um mentamálanevndina og fíggjarnevndina, at taka undir við:

at ein óheftur grunnur "Minnisgrunnur William Heinesens" verður stovnsettur við eginogn á kr. 275.000,00.
at Tórshavnar kommuna veitir grunninum bindandi tilsøgn um stuðul á kr. 800.000,00 til ístandsetan av ognunum.
at Tórshavnar kommuna gevur grunninum bindandi tilsøgn um árligan rakstrarstuðul (50.000) og rindar møguligt hall (inntil 50.000 árliga). Hetta skal Innlendismálaráðið góðkenna fyrst.

Mælt verður eisini til at endurskoða samtyktina, um grunnurin ikki fær 3 mill. í stuðli frá Velux Fondinum.

**Mentamálanevndin 3. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta kr. 1.075.000,00 av konto 64.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samband við velux-grunnin fyri at tryggja, at endaliga umsóknin inniheldur allar viðkomandi upplýsingar.

Í hesum sambandi hevur skrivstovan hjá Velux-grunninum boðað frá, at ynskiligt hevði verið, um tilsøgnin um rakstrarstuðul og rindan av møguligum halli hevur ein ávísan fastleika og t.d. er galdandi í minsta lagi í 10 ár.

Tí mælir mentamálaleiðarin til, at tilsøgnin um rakstrarstuðul og rindan av halli í fyrsta lagi verður galdandi í minsta lagi 10 ár.

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini, og at tilsøgnin um rakstrarstuðul og rindan av halli í fyrsta lagi verður galdandi í minsta lagi 10 ár.

**98/06** **2006-1339**

**Grannskoðarafrágreiðing 2005 hjá Tórshavnar havn.**

**Havnanevndin 18. apríl 2006:** Framløgd.

Samtykt at leggja grannskoðarafrágreiðingina fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Framlagt.

**Býráðið 18. mai 2006:** Framlagt.

99/06 **2006-1338**

**Uppskot til roknskapin 2005 hjá Tórshavnar havn**

**Havnanevndin 18. apríl 2006:** Góðkent og samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 18. mai 2006:** Einmælt samtykt.

100/06 **2006-1337**

**Bátahylur í Álakeri.**

**Tørvur:**
Bíðilistin yvir bátapláss í Tórshavn er umleið 200. Teir elstu umsøkjararnir eru frá 1993.

Tá pláss hava verið tøk, hevur tað víst seg, at fleiri av umsøkjarunum taka umsóknina aftur.

Tað kunnu eisini vera fleiri umsøkjarar, sum aftra seg við at søkja, tí møgleiki ikki er at fáa pláss.

Við øllum hesum í huga, er tað uttan iva tørvur á fleiri bátaplássum í Tórshavn, men ilt er at siga hvussu nógvum.

Um bátaplássini skulu vera í Tórshavn, eru trupult at fáa eygað á annað stað enn Álakersvík.

**Tilmæli frá havnameistaranum**:
Mælt verður til, at havnameistarin setir programmbólk, sum ger byggiprogramm at leggja aftur fyri nevndina.

**Havnanevndin 17. januar 2005:** Nevndin tekur undir við tilmælinum og ynskir at fáa svar aftur frá programmbólkinum innan 1. mai 2005.

**Ískoyti:**
Tað kann verða rættiliga fitt av brimi í Álakersvík, tá ættin er millum landnyrðing og sunnan. Fyri at fáa tað neyðugu kyrruna í tí ætlaða bátahylinum, er neyðugt at gera eitt grótkast.

Við verandi umstøðum "svølgir" Álakersvík ein part av alduni, sum annars hevði komið inn í á Eystaru- og Vestaru vág. Neyðugt er tí at hava í huga, at eitt nýtt grótkast má ikki beina alduna inn á báðar vágirnar og ger kyrruna verri, enn hon er nú.

Landsverk hevur fyri kortum fingið eitt telduprogramm, sum kann geva eina rættiliga góða ábending um, hvørja ávirkan eitt grótkast hevur, og hvussu hetta skal leggjast fyri at geva tað besta úrslitið. Landsverk eru ikki enn lidnir at gera hetta arbeiðið.

Programmbólkurin hevur gjørt eitt ávegis byggiprogramm. Í hesum ávegis byggiprogramminum er pláss fyri umleið 120 bátum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at arbeiða víðari við byggiprogramminum.

**Havnanevndin 17. mai 2005:** Samtykt at nevndin fer á staðið til næsta fund, tá málið verður tikið uppaftur.

**Havnanevndin 17. juni 2005:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Annika Olsen, tekur undir við at arbeitt verður víðari við byggiskránni, og at atlit verða tikin til viðmerkingarnar frá neystafelagnum og til kappróðurin á vágni.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til, at arbeitt verður víðari við uppskotinum frá Byggitek.

**Ískoyti:**
Landsverk hevur gjørt numeriskar simuleringar av kyrruviðurskifunum í Tórshavnar havn, um verjugarður verður gjørdur í Álakeri.

Av tí at alduviðurskiftini í havnini broytast nakað, tá ein verjugarður verður lagdur fyri Álakersvík, mælir Landsverk til, at modelroyndir verða gjørdar.

Um DHI skal gera modelroyndir, kostar hettar umleið 1. mió.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging.

**Havnanevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta 1. mió. kr. av kassapeningi hjá Tórshavnar havn til modelroyndir.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 18. mai 2006:** Einmælt samtykt.

**101/06** **2005-1430**

**Glyvursvegur**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál nr 2001-0695 har umsitingin saman við ráðgeva legði fram skitsuuppskot um vegaføring av Glyvursvegnum.

Støða skal takast til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at bjóða partar av Glyvursvegi út í innbodna lisitatión. Talan er um vegastrekkið frá Reynsgøtu til økið oman fyri Kvíggjartún (árakað rørportrið á Glyvursvegi oman fyri Fíggjarmálaráðið), og er longdin á vegastrekkinum uml. 500 m.

Skal farast undir fyrireikandi arbeiði nú er umráðandi, at støða eisini verður tikin til, um farast skal undir samráðingar um framtíðarviðurskifti við teir matrikuleigarar, ið búgva fram við vegnum, tí á ávísum strekkjum verður talan um stóran hæddarmun frá lidnum vegi til verandi lendi, og hesir hava krav upp á at fáa upplýsingar frá kommununi um, hvussu vegarbeiðið ætlandi skal verða frágingið.

Harumframt er eisini neyðugt, at støða verður tikin til um farast skal undir samráðingar við íbúgvar, sum verða noyddir at lata lendi til Glyvursveg.

Vegaarbeiðið kemur at viðføra størri hæddarmun millum nýtt og verandi lendi á fylgjandi matriklum:
- matr. nr. 4 br, Argir
- matr. nr. 4 bg, Argir
- matr. nr. 39b, Argir
- matr. nr. 40d, Argir
- matr. nr. 41a, Argir
- matr. nr. 42a, Argir

Harumframt kemur vegaarbeiði at krevja lendi frá:
- matr. nr. 39a, Argir (vídd 610 m²)
- matr. nr. 40a, Argir (vídd 421 m²)
- matr. nr. 56a, Argir (vídd uml. 9.500 m²)

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Kostnaðurin fyri vegastrekkið er leystliga mett til kr. 8 mió. (tá eru útreiðslur fyri projekt og eftirlit, møguliga ognartøku og annars matrikulloysnir ikki tikið við í metingini).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til:

at taka undir við at bjóða arbeiðið av Glyvursvegi frá Reynsgøtu til rørportrið á Glyvursveg við Kvíggjartún út í innbodna lisitatión skjótast gjørligt,

at umsitingin fer í samráðingar við avvarðandi matrikuleigarar um loysnir at leggja fyri nevndina aftur
at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina
at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina
at innkomnu tilboðini verða at leggja fyri teknisku nevnd aftur

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Nevndin samtykti eisini, at vegaprojektið verður umfatað av gongu- og súkklu-breyt.

Umsitingin verður biðin um at kanna møguleikarnar fyri at planta viðarvøkstur fram við vegskráunum sum umhvørvisvernd.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgevanum p/f Landsbyggifelagnum verið í sambandi við matrikuleigararnar fram við 5. byggistigi av Glyvursvegi sambært samtykt í teknisku nevnd tann 2. juni í 2005. Byggistigið umfatar vegastrekkið úr st. $5^{40}$ í st. $11^{00}$, sum er frá Reynsgøtu og vestur í móti bygninginum Albert Hall.

**Viðurskiti í grannalagnum:**
Eigararnir av matriklunum í niðara borði hava sett fram ynski, um at fáa vegin fluttan longur norður fyri ikki at koma so nær at húsunum.

Dagstovnurin á Argjum ynskir at fáa gongutunnil yvir um Glyvursvegin, so at børnini sleppa trygt niðan um vegin til fríøkið omanfyri. Somuleiðis ynskja tey, at kommunan ger ein gongutunnil tvørtur undir Reynsgøtu. Hetta fyri at børnini trygt kunnu fara oman til Sandá. Víst verður til j. nr. 2005-2253/4 og 5.

Dagstovnurin Løkjutún á Argjum ynskir somuleiðis eina trygga farleið undir Reynsgøtu.

Umsitingin hevur havt kunnandi fundir við eigarafeløg í grannalagnum. Eigarafelagið setir fram ynski um at fáa ein gongutunnil tvørtur um Glyvursvegin

fram við Reysngøtu, tí har ganga sera nógv børn fram við Reynsgøtu og niðan á ítróttarøkið.

Eisini eru ynski um at fáa gongutunlar undir Glyvursvegin og niðan á Hamarin á Argjum, har sum gøtur eru frá bygdum økjum frammanundan.

**Linjuføringin:**
Góðkenda linjuføringin (juli profilurin) í teknisku nevnd (sí mál nr. 2006-0695) lá til grund fyri samráðingunum við grannarnar fram við Glyvursvegnum.

Støðan í dag er tann, at eftir samráðingar við grannar í økinum fyriliggja tvær broytingar. Tann fyrra broytingin er, at vegurin er lækkaður í mun til uppruna uppskotið. Seinna broytingin inniber, at vegurin er fluttur uml. 5 m longur niðan í lendið.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Umsitingin greiðir frá kostnaðinum fyri upprunaliga uppskotinum, fyrra broyting-aruppskotinum og seinna broytingaruppskotinum.

Nevndin skal taka støðu til:

1. um arbeiðast skal víðari við:
   a. verandi uppskotinum,
   b. fyrra broytingaruppskotinum, har vegurin er lækkaður
   c. seinna broytingaruppskotinum, har vegurin verður fluttur uml. 5 m longur niðan.
2. um undirføringar sum gongutunlar skulu gerast.
3. um ein borgarafundur verður hildin fyri at kunna um verkætlanina og fáa lýst ynskini hjá borgarunum betri sum heild, áðrenn farið verður undir detailprojektering og útbjóðing.
4. um farast skal undir at gera ráðgevingarsáttmála við p/f Landsbyggifelagið um detailprojektering, útbjóðing, fakeftirlit, byggileiðslu, projektuppfylging og skráseting.

Umsitingin greiðir gongdini í frá málinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við fyrra broytingaruppskotinum, har vegurin er lækkaður í mun til fyrru linjuføringina, gera gongutunnil millum framtíðar skúlaøkið matr. nr.4bs ella 4 cl, Argir, og matr. nr. 4 br, Argir, at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið og biðja um kr. 1.000.000,00 til detail-projektering v.m., og at leggja málið aftur fyri teknisku nevnd til endaliga støðu-takan.

Mælt verður harumframt til at halda ein borgarafund.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Málið tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 4. mai 2006:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka undir við fyrra broytingaruppskotinum, ( j.nr. 2006-1118/3), at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið og biðja um kr. 560.000,00 til detailprojektering v.m.

Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen, tekur ikki undir við verkætlanini, tí framløgdu myndirnar á fundinum vísa, at vegaskráin gongur íbúgvunum á staðnum ov nær.

Ein meiriluti Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen, Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen, tekur undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum um at halda borgarafund.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og at játta kr. 560.000,00 av íløgum.

**Býráðið 18. mai 2006:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen og Bjarti Mohr.

Ímóti atkvøddu: Katrin Dahl Jakobsen.

**102/06** **2006-1520**

**Umsókn frá Katrini J. Joensen og Jóan Peturi Patursson, dagfest 3. mai 2006, um strikan av servitutti á matr. nr. 706h.**

Servitutturin snýr seg um háspenning o.a., men er eingin háspenningarlinja á ognini í dag.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at strika servituttin.

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**103/06** **2006-0932**

**Arbeiðstíðarpolitikkur hjá Tórshavnar kommunu**

**Endamál**
Endamálið hjá kommununi við at hava ein arbeiðstíðarpolitikk er at skapa so stórt samanhang millum tørvin hjá arbeiðsplássinum at hava fólk til arbeiðis og kunna skipa arbeiðið á ein nøktandi hátt og tørvin hjá fólki at hava frí (privatlívið).

Tá arbeiðstíð, vaktir o.a. verða løgd, eigur hetta at verða gjørt í samráð við starvsfólkini, so fyrilit verður víst einstaka starvsfólkinum í tann mun, hetta letur seg gera. Arbeiðið eigur sum høvuðsregla at verða gjørt í vanligari arbeiðstíð.

Sí sáttmálar um arbeiðstíð

**Døgurðasteðgur**
Døgurðasteðgurin ella døgurðatímin er ikki einans roknaður sum matarstegður, men líkanógv sum ein hvíld aftaná 4 tímars arbeiði. Hartil kemur, at dagliga avrikið hjá starvsfólki uppá tóman maga og uttan hvíld, minkar í longdini.

Øll, sum starvast hjá kommununi meira enn hálvan dag, eiga at halda døgurðasteðg. Hvørt arbeiðspláss sær eigur at áseta nærri reglar fyri døgurðasteðginum.

Í flestu sáttmálum er roknað við døgurðasteðgi, ið hædd skal verða tikin fyri.

**Niðursett arbeiðstíð**
Tá ið starvsfólk er sett til at arbeiða fulla tíð og ynskir styttri arbeiðstíð, er talan um niðursetta arbeiðstíð. Nærmasti leiðari kann játta niðursetta arbeiðstíð eftir einari ítøkiligari meting.

Treytirnar fyri niðursettari arbeiðstíð eru m.a. at niðursett tíð skal:

- vera sambærlig við uppgávur og upp- og afturlatingartíðir á arbeiðsplássinum.
- hóska saman við tíðini hjá hinum starvsfólkunum á deildini
- skipast soleiðis at tilber at manna starvið/størvini
- taka hædd fyri hølisviðurskiftum, til dømis, at tvey starvsfólk máa deilast um eitt skrivstovuborð

Niðursett arbeiðstíð kann ikki vera lægri enn hálv tíð.

Hetta kann merkja, at niðursett arbeiðstíð verður játtað í heilum døgum ella heilum vikum, soleiðis at annað starvsfólk kann koma inn í staðin fyri.

Niðursett arbeiðstíð verður játtað fyribils og í eitt ár í senn, tvs. at niðursett arbeiðstíð skal endurskoðast árliga. Tá ið starvsfólk fara úr starvi, má niðursetta arbeiðstíðin á deildini/stovninum somuleiðis eftirmetast. Tá ið starvsfólk skulu arbeiða aftur fulla tíð, má hædd takast fyri normeringini á deildini/stovninum.

Broyting í arbeiðstíðini skal fráboðast við rímiligari freist, og fráboðanarskylda sambært sáttmála og lóg má haldast.

Í serligum førum kann niðursett arbeiðstíð játtast, sjálvt um tað ikki er sambærligt við tørvin hjá arbeiðsplássinum. Slík mál kunnu bara játtast av stjórnini.

Leiðarar kunnu sum meginregla ikki arbeiða niðursetta tíð.

**Fleksskipan**
Fyri at skapa størri samanhang millum arbeiðslív og privatlív hjá starvsfólkinum ynskir Tórshavnar kommuna at bjóða starvsfólkunum flekstíðarskipan, har tað er í samsvari við útinnan av arbeiðnum.

Ein flekstíðarskipan merkir, at starvsfólk innan fyri eitt ávíst tíðarskeið sjálvi kunnu avgera, nær tey møta og fara. Stovnurin ella deildin má tó altíð vera mannað í upplatingartíðini, eisini í flekstíðini.

Tað mest vanliga er við fleksskipan á skrivstovum, men tað ber eisini til at seta í verk flekstíðarskipan á eitt nú ansingarstovnum. Treytað av, hvussu nógv børn eru á stovninum, kunnu starvsfólkini fleksa í mun til barnatalið. Ein flekstíðarskipan krevur tó, at klokkuskipan verður innførd.

Link: Sí annars vegleiðing um klokkuskipan.

**Heimaarbeiði**
Starvsfólk, sum hava ein serligan tørv á at kunna arbeiða uttan fyri vanliga skriv-stovutíð, kunnu fáa heimaarbeiðspláss. Heimaarbeiðspláss eru í høvuðsheitum ætlað starvsfólkum í leiðandi størvum. Kommunustjórin játtar heimaarbeiðspláss í hvørjum einstøkum føri.

Við heimaarbeiðspláss fær starvsfólkið teldu og internetsamband frá kommununi.

**Meirarbeiði**
Starvsfólk í leiðandi størvum fáa í høvuðsheitum ikki yvirtíð. Tey eru síni ”egnu leiðarar”, og kunnu ikki áleggja sær sjálvum yvirtíð. Tá ið leiðarar arbeiða meira enn áløgdu arbeiðstíðina, verður tosað um meirarbeiði. Meirarbeiði verður sum meginregla ikki samsýnt. Í undantaksførum kann víkjast frá hesum, tá ið eitthvørt serligt átak hevur verið, sum hevur vart yvir eitt longri tíðarskeið, og meirarbeiðið er sera rúgvismikið og avtalað frammanundan.

**Yvirtíðararbeiði**
Starvsfólk eiga sum meginreglu ikki at hava yvirtíðararbeiði. Yvirtíðararbeiði skal avtalast við viðkomandi stjóra frammanundan og verður annars goldið sambært ásetingunum í sáttmálunum.

**Avspákan**
Avspákan verður avtalað við viðkomandi leiðara.

**Ískoyti:**
Arbeiðstíðarpolitikkurin hevur verið til ummælis hjá starvsfólkunum. Fáar viðmerkingar eru komnar.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin mælir fíggjanevndini til at góðkenna uppskotið til arbeiðstíðarpolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, og Leivur Hansen, tekur undir við uppskotinum og leggur málið fyri býráðið.

Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 18. mai 2006:** Framlagt.

**104/06** **2006-1552**

**Ársroknskapurin og grannskoðaraprotokoll fyri 2005 hjá Tórshavnar kommunu.**

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna roknskapin.

Grannskoðaraprotokollin verður framløgd.

**Býráðið 18. mai 2006:** Roknskapurin einmælt góðkendur og granskoðaraprotokollin framløgd.

**105/06** **2001-0759**

**Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 1118b, Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsókn frá Finni Jógvani Rubeksen, dagfest 13. mars 2001, um sundurbýti av matr. nr. 1118 b, er send frá matrikulstovuni til ummælis.

Grundøkið er 1709 m² (b: 23,6 m l: 33,0 m).

Verandi ogn liggur innan A1-sethúsaøkið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2001:** Samtykt at viðmæla umsóknini við treytum, sum umsitingin setur, og við vanligum útstykkingartreytum.

**Ískoyti:**
Nýggj umsókn komin frá Finni Rubeksen, undir Gráasteini 74, um at frábýta, í fyrsta umfari tvey grundstykki sum liggja við vegin. Hjáløgd útstykkingarætlan fyri alla trøðna.

Øll trøðin er 11.561 m² stór.
Ein partur av trøðni er A1 øki, og hin parturin er A2 øki.
Matr. nr. 1118a, Tórshavn, liggur við vegin undir Gráastein.

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði**
1. Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tilíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við bústaðarøkið kann byggivaldið geva serloyvi til at byggjast kunnu handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m². Tá byggingin verður framd eftir heildarætlan, sum býráðið hevur góðkent og tryggjað, ella eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m², tó í minsta lagi 400 m² fyri stakhús og 300 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirra ásettu minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

**§ 6. Ásetingar fyri umráðispartarnar A2 í 3. grundumráði**
1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.

2. Útstykking til tilíka bygging verður einans loyvd, um hon hóskar við eina vegleiðandi byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðkenna útstykkingarætlanina og biðja umsøkjaran koma við einum tekniskum projekti, sum skal góðkennast av teknisku deild/nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsøkjarin er komin við einum nýggjum uppskoti til útstykkking á matr. nr. 1118a og 1118b, Tórshavn. Tekning nr. 1.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðkenna tað nýggju útstykkingarætlanina (tekning nr. 1) við teirri treyt, at útstykkingarætlanin á ovara parti av matr. nr. 1120, 1119 og 1118a, Tórshavn, hjá KJ. Contractors somuleiðis verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Nú er ætlanin hjá KJ Contractors góðkend.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðkenna tað nýggju útstykkingarætlanina (tekning nr. 1) við vanligum treytum, treytað av at KJ Contractors ger vegin sambært teirra góðkendu útstykkingarætlan.

Samstundis verður eigarin av matr. nr. 1118b, Tórshavn, biðin um at koma við einum tekniskum projekti av útstykkingini, sum eisini skal góðkennast av tekniskum deild/nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2006:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, tó so at hildið verður fast við rættindini hjá kommununi og krevja tey gjøld, sum kommunan hevur rætt til.

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**106/06** **<u>1999-2581</u>**

**<u>Broytingar í kommunustýrisskipanini</u>.**

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við broytingunum.

**Ískoyti:**
Við heimild í kunngerð nr. 14 frá 15. mars 2006 um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini verða gjørdar hesar broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu:

**1.**

Í 7. parti, § 39, 1. petti, verður "38. flokk" broytt til "39. flokk"

**2.**

Í 7. parti, verður § 39, 11. petti, orðað soleiðis:

"**11. petti.** Árliga fasta samsýningin til formenn í byggi- og býarskipanarnevndini, havnanevndini, heilsu- og umhvørvisnevndini, mentamálanevndini, sosialu nevnd og teknisku nevnd er 3 ferðir nevndarsamsýningina sambært § 6, stk. 2, nr. 5, í kunngerðini um samsýning."

Í 7. parti, verða § 39, 12. og 17. petti, strikað.

13.-18. petti verða hereftir 12.-16. petti.

**3.**

Í 7. parti, verða § 39, 13.-14. petti, sum verða 12.-13. petti, orðað soleiðis:

**"12. petti.** Árliga fasta nevndarsamsýningin til býráðslim, sum er limur í einari av føstu nevndunum (byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini, havna-nevndini, heilsu- og umhvørvisnevndini, mentamálanevndini, sosialu nevnd og teknisku nevnd) er 12 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini um samsýning.

**13. petti.** Formenn og nevndarlimir í hesum nevndunum fáa fundarsamsýning eftir reglunum í § 2, stk. 2, í kunngerðini um samsýning, er ikki annnað ásett í aðrari lóg:

1) Staðbundnu nevndunum
2) hegn- og vatnsýnisnevndini
3) leigunevndini
4) brunanevndini
5) hýruvognsnevndini
6) skúlaráðnum
7) ferðslunevndini
8) gøtunavnanevndini
9) musikkskúlanevndini
10) nevndini fyri vardar íbúir
11) kollegiunevndini
12) M. A. Jacobsens virðislønarnevndini og
13) barnabókaheiðurslønarnevndini."

**4.**

Í 7. parti, verður § 39, 18. petti, sum verður 16. petti, orðað soleiðis:

“**16. petti.** Onnur enn kommunustýrislimir fáa fundarpening fyri arbeiði í nevndum o.l., sum býráðið hevur valt tey í, eftir reglunum í § 9 í kunngerðini um samsýning.”

**5.**

Sum nýtt 17. petti verður sett:

“**17. petti.** Býráðið og føstu nevndirnar kunnu taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann fara uttanlands vegna skeiðsluttøku, kunningarferð, umboðan v.m. Tá verður samsýning ella endurgjald latið einstøku kommunustýrislimunum eftir reglunum í 4 í kunngerðini um samsýning.

Ynskir ein nevnd at fara uttanlands, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at fara uttanlands, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

Borgarstjórin ferðast sambært egnari fíggjarætlan og kann góðkenna, at varamaður luttekur í hansara stað.

Verða ørindini samsýnt av øðrum, verður eingin samsýning latin frá býráðnum.”

**6.**

Hesar broytingar koma í gildi 1. mai 2006.

**4. Viðmerkinar til einstøku broytingarnar:**

**Ad 1**

Við broytingini verður borgarstjórin umflokkaður úr 38. í 39. flokk. Hetta hevur við sær, at mánaðarliga samsýningin hækkar úr kr. 43.826,14 til kr. 46.917,20.

**Ad 2**

Við umorðingini av 11. petti verða 11. og 12. petti samanskrivað. Hetta hevur onga broyting við sær viðv. upphæddini, ið samsýnt verður við.

**Ad 3**

13. petti verður broytt til 12. petti, samstundis sum tilvísingin til kunngerðina um samsýning verður nágreinað. Upphæddin, ið samsýnt verður við, verður ikki broytt.

Broytingarnar í 13. petti (áður 14. petti) hava við sær, at allir kommunustýrislimir, við undantaki av borgarstjóranum, ið eru limir í brunanevndini, hýruvognsnevndini og øllum teim staðbundnu nevndunum, fara at fáa fundarpening fyri

arbeiðið í hesum nevndunum. Eisini verða allar aðrar nevndir enn føstu nevndirnar nú javntsettar og umrøddar í somu áseting.

Við broytingini verða 13. (áður 14. petti) og 17. petti samanskrivað. Hetta er tí, at tær nevndir, ið 17. petti umrøður, nú verða uppreksaðar í 13. petti, har samsýningin til teir kommunustýrislimir, ið eru nevndarlimir, eisini verður ásett.

**Ad 4**
Einasta broytingin er, at nágreinað verður, at tað snýr seg um persónar, ið býráðið hevur valt í nevnd o.l., eins og tilvísingin til grein 8 í kunngerðini um samsýning verður rættað til grein 9. Hetta eru onnur enn kommunustýrislimir (t.d. limir í staðbundnu nevndunum), ið eru vald í nevndir og annað.

**Ad 5**
Nágreinað verður, at samsýningin til kommunustýrislimir, ið ferðast uttanlands, er fundarpeningur eftir vanligu reglunum ella fyri skjalprógvaða mista inntøku.

**Ad 6**
Ásett verður, at broytingarnar koma í gildi 1. mai 2006.

**Tilmæli**
Kommunustjórin mælir til, at broytingarnar omanfyri undir pkt. 3, nr. 1-6, verða gjørdar í kommunustýrisskipanini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Hesar rættingar eru komnar aftrat í 7. parti:

**§ 39, 13. petti:**
6) skúlaráðnum verður broytt til skúlastýrunum

**§ 39, 17. petti. verður soljóðandi:**
**<u>17. petti</u>.** Býráðið og føstu nevndirnar kunnu taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann luttaka á skeiði, kunningarferð, umboðan v.m. bæði innan- og uttanlands. Tá verður samsýning ella endurgjald latið einstøku kommunustýrislimunum eftir reglunum í 4 í kunngerðini um samsýning.

Ynskir ein nevnd at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

Borgarstjórin ferðast sambært egnari fíggjarætlan og kann góðkenna, at varamaður luttekur í hansara stað.

Verða ørindini samsýnt av øðrum, verður eingin samsýning latin frá býráðnum.

**Broytingar í viðmerkingunum til einstøku broytingarnar:**
**Ad 5:**
Nágreinað verður, at samsýningin til kommunustýrislimir, ið ferðast innan- ella uttanlands, er fundarpeningur eftir vanligu reglunum ella fyri skjalprógvaða mista inntøku.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við broytingunum.

Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen taka støðu á býráðsfundi.

**Ískoyti:**
Broytingin í § 39, 13. petti, har ásett verður, at allir nevndarlimir og nevndarformenn í øðrum nevndum enn teim føstu nevndunum fáa fundarpening, vil hava við sær, at siðvenjan við at rinda kommunustýrislimum kr. 5.000,00 árliga fyri luttøku á fundum í brunanevnd, hýruvognsnevnd og staðbundnu nevndunum verður broytt.

Broytingin hevði sannlíkt havt við sær, at samsýningin hevði minkað, tí talið av fundum í hesum nevndunum er vanliga ikki so stórt, at samanlagdi árligi fundarpeningurin kemur upp á kr. 5.000,00.

Kommunustjórin mælir til at staðfesta galdandi siðvenju við at broyta 13. petti soleiðis, at ásett verður staðiliga, at kommunustýrislimir, ið eru limir í brunanevndini, hýruvognsnevndini ella staðbundnari nevnd, fáa kr. 5.000,00 í árligari fastari samsýning fyri arbeiði í hesum nevndunum.

**Sambært broytingaruppskotinum verður 13. petti soljóðandi:**

**”13. petti.** Kommunustýrislimir, ið eru formenn og nevndarlimir í hesum nevndunum, fáa fundarsamsýning eftir reglunum í § 2, stk. 2, í kunngerðini um samsýning, er ikki annað ásett í aðrari lóg:

1. hegn- og vatnsýnisnevndini
2. leigunevndini
3. skúlastýrunum
4. ferðslunevndini
5. gøtunavnanevndini
6. musikkskúlanevndini
7. nevndini fyri vardar íbúðir
8. kollegiunevndini
9. M. A. Jacobsens virðislønarnevndini og
10. barnabókaheiðurslønarnevndini.

Kommunustýrislimir, ið eru formenn ella nevndarlimir í hesum nevndum, fáa eina árliga fasta samsýning á kr. 5.000,00:

1. staðbundnu nevndunum
2. brunanevndini
3. hýruvognsnevndini.”

**Fíggjarnevndin 18. mai 2006:** Fíggjarnevndin er kunnað um broytingauppskotið og borgarstjórin mælir til at orða 13. petti soleiðis:

**”13. petti.** Kommunustýrislimir, ið eru formenn ella nevndarlimir í øðrum nevndum, sum býráðið hevur valt tey í, fáa fundarsamsýning eftir reglunum í § 2, stk. 2, í kunngerðini um samsýning, er ikki annað ásett í aðrari lóg.

Kommunustýrislimir, ið eru formenn ella nevndarlimir í hesum nevndum, fáa tó eina árliga fasta samsýning á kr. 5.000,00:

1. staðbundnu nevndunum
2. brunanevndini
3. hýruvognsnevndini.”

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**107/06** **<u>2005-0237</u>**

**<u>Val av eykalimi til barnaverndarnevndina</u>**

Kári Árting, sum er tiltakslimur fyri Birgir Sondum, hevur boðað frá, at hann ikki kann verða tiltakslimur longur.

**Býráðið 18. mai 2006:** Valdur varð Høgni Mohr.

**108/06** **<u>2004-1759</u>**

**<u>Uppskot til burturveiting av spillvatni frá Vestaru vág - Reinsan av Vestaru vág - høvuðskloakkin frá Dalavegnum til Tórfinsgøtu</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur latið gera uppskot um burturveiting av spillvatni frá Vestaru vág saman við sp/f Martin Leo.

Arbeiðið er uppsett at verða gjørt í fleiri stigum. Fyrsta stig, at fáa kloakkina frá Tórsgøtu og út í Bakka, er liðugt. Hetta spillvatnið verður pumpað niðan gjøgnum Mylnugøtu niðan í Havnará.

Kloakkin gjøgnum Gríms Kambans gøtu er eisini løgd. Henda kloakk skal føra spillvatnið frá uttara parti av Rættará í pumpubrunn, ið verður lagdur á Skálatrøð. Henda leiðing kemur at hava samband við kloakkina í Mylnugøtu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við sp/f Martin Leo, gjørt projekt við kostnaðarmeting av framhaldandi kloakkarbeiðinum frá Dalavegi til Torfinsgøtu.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Arbeiðið er mett at kosta uml. kr. 3.936.178,00 íroknað projektering, eftirlit ókendar útreiðslur og mvg. (sí j. nr. 2004-1759/17).

Mett verður at skilabest er at bjóða arbeiðið út í bundnari lisitatión, og at arbeiðið verður boðið soleiðis út, at arbeiðstíðin verður so stutt sum møguligt, so at ferðslan verður tarnað sum minst.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti at leggja høvuðskloakkleiðing frá Dalavegnum til Torfinsgøtu og at heita á býráðið um fíggjarnevndina at taka undir við projektinum og at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitation at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við projektinum.

**Býráðið 30. mars 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tilboðini vórðu upplatin á teknistovuni hjá sp/f Martin E. Leo mánadagin 16. mai 2006, kl.11.00, og vóru tey hesi:

| | | |
|---|---|---|
| P/F Byggitek. | kr. | 2.927.969,00 |
| J&K Petersen Contraktors P/F | kr. | 2.958.840,00 |
| Sp/f Plan v/ Johs. Hellisdal | kr. | 3.849.415,00 |
| Articon | kr. | 3.983.485,00 |

Eftir at hava kannað projektið, vísir tað seg, at ov nógvir kantsteinar vórðu roknaðir við í projektinum. Hetta er rættað, og er kostnaðurin rættaður samsvarandi hesum.

Tað lægsta tilboðið kemur so at verða kr. 2.529.949,00.

Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið verður sostatt kr. 4.050.707,00, tá er alt íroknað. Sí j.nr. 2004-1759/23.

Sp/f Martin E. Leo mæla til at tikið verður við tilboðnum frá p/f Byggitek áljóðandi krónur 2.529.949,00 og sáttmáli verður gjørdur við byggifelagið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka av tilboðnum frá p/f Byggitek álj. kr. 2.529.949 og at heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 4.050.707,00 av íløgum fyri kloakk í 2006.

**Tekniska nevnd 17. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |